# Skótaráðgevi

***KFUM-skótarnir í Føroyum sóknast eftir einum ráðgeva til landsumfevnandi rágevaraarbeiði.***

**Uppgávur**

· Høvuðsuppgávan er at stuðla og menna skótaarbeiði runt um í landinum
· Skipan av útbúgvingararbeiðinum
· Samskipan av landsumfevnandi skótavirksemi
· Skrivaraarbeiði hjá landsnevndini
· Nakað av fyrisitingarligum uppgávum

**Vit vænta at**

· tú kanst arbeiða sjálvtstøðugt, og ert røkin
· tú hevur hug at arbeiða við menning av leiðslu av ungdómsfelagskapum
· tú hevur hug at arbeiða við børnum og ungum
· tú ert vanur at nýta teldu
· tú ert limur í fólkakirkjuni
· tú hevur kunnleika til skótarørsluna
· tú ert til reiðar at arbeiða skeivar arbeiðstíðir, og at ferðast í Føroyum og av og á uttanlands.

*Tað er ein fyrimunur, men eingin treyt, um tú hevur verið leiðari í skótarørsluni.*

**Ert tú tann rætti kunnu vit bjóða tær**

· starv ¾ tíð.
· starvstað á skrivstovuni hjá KFUM-skótunum í Føroyum, ið er í Tórshavn.
· starv, ið krevur nakað av ferðing og arbeiði um kvøldarnar og í vikuskiftinum.
· løn sambært avtalu.

*Meira fæst at vita við at venda sær til KFUM-skótarnar í Føroyum á telefon 311075 ella 224715.*

Umsóknarfreistin er sett til 23. oktober 2006. Starvið verður at seta frá 01. november 2006 ella eftir avtalu. Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum verða at senda til:

**KFUM-skótarnir í Føroyum**
**Postboks 1080**
**110 Tórshavn**

*KFUM-skótarnir í Føroyum er ein landsumfevnandi felagskapur hvørs endamál er: Eitt kirkjuligt arbeiði við tí endamáli at lata børn og ung møta gleðiboðskapinum, og við tí lyndisskapandi frítíðarvirksemi at uppala til dugandi samfelagsborgarar, at vera sjálvstøðug og demokratisk, at kenna ábyrgd og virða onnur fólkasløg.*

---

# Brunaumsjónar-maður

Hervið verður søkt eftir brunaumsjónarmanni til Vestmanna Kommunu at byrja 1. november 2006.

**Brunaumsjónarmaðurin skal**

· virka eftir reglugerð fyri brunaumsjónarmenn, brunasamtykt fyri Vestmanna Kommunu og annars eftir lógum og reglugerðum, sum eru galdandi á økinum.

· verða leiðari av Vestmanna Sløkki- og Bjargingarliði, og verða við til at menna liðið.

· hava tikið ella skal taka neyðug skeið sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmanningum og brunaumsjónarmonnum.

Starvið er at rokna sum sjálvboðin tænasta.

Møgulig samsýning og setanartreytir annars verða eftir nærri avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 16. oktober 2006, kl. 1200.

Kommunan skilar sær rætt til at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 470110.

**Vestmanna Kommuna**

---

# Leiðari til frítíðarskúlan í Runavíkar kommunu

Søkt verður eftir leiðara til Frítíðarskúlan í Saltangará.

Frítíðarskúlin heldur til í gomlu læknahúsunum á Heiðavegi 22. Frítíðarskúlin er normeraður til 37 børn.

Arbeitt verður við at økja um frítíðarskúlatilboðið og útvega frítíðarskúlanum nýggj og størri hølir. Nýggi leiðarin kemur at hava aktivan lut í hesum arbeiðið.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann á leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum, heldur fram við at menna frítíðartilboðið. Umráðandi er, at umsøkjarin evnar at ganga nýggjar leiðir, dugir væl at samstarva og er sjónligur í sínum leiðarastarvi.

Starvið er 40 tímar um vikuna, við setan frá 1. november ella skjótast gjørligt. Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, lønt eftir lønarstigi 18 til 24.

Bert umsøkjarar við námsfrøðiligum prógvi ella líknandi kunnu søkja starvið.

Nærri fæst at vita um starvið, við at tosa við Jákup Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000

Umsøkn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Runavíkar kommunu í hendi 16. oktober 2006, kl 12.00.

Runavíkar Kommuna

**Runavíkar Kommuna**
Postboks 139
Heiðavegur 26
600 Saltangará

---

Atlantic Brokers Ltd

**Minni stál línuskip**

við loyvum, verður lýst til sølu um hóskandi boð fæst.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 212238
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com

---

# Reingerðarfólk til Vestmanna skúla

Fyri eitt av reingerðarfólkunum í farloyvi verður hervið søkt eftir avloysara at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðið er tíðaravmarkað til eitt ár frá 1. november 2006 at rokna.

Arbeiðið er lønt sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Vestmanna Kommunu, tlf. 470110.

Skrivlig umsókn skal verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 16. oktober 2006, kl. 1200.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

**Vestmanna Kommuna**

---

# Til sølu

Tvey hús á Tvøroyri til sølu.

**Tlf. 0045 31257797**

---

# Søkt verður eftir

**fólki at taka sær av tí almennu svimjingini**

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum lívbjargari.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. nr. 212084.

Umsóknarfreist er 13. oktober er kl. 12.00.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
Skúlavegur 8
400 Oyrarbakki

---

Lesið Sosialin -so eru tit við!